tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 06.12.2024 kl. 16:00
**Málnr.:** 20/00367

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer, Kristina Roest, Eyð Jóna Eidesgaard

Varalimir:

Ikki møtt:

Viðmerking: Eyð Eidesgaard metti seg at verða ógegniga í málinum 78/24 og 79/24 og fór av fundinum, tá hesi mál vóru til viðgerðar.

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 75/24 | 24/00261-3 | Sjógøta 2. -Útskifting av gomlum oljufýri til jarðhita - nýggj orkuloysn til upphiting í Posta bygninginum - Tvøroyrar kommuna og Føroya Banki |
| 76/24 | 24/00341-2 | Uppskot til ummælis um Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum |
| 77/24 | 24/00283-3 | BVT -Barnaverndartænastan -eykajáttan 2024 |
| 78/24 | 24/00094-7 | P/F Varðin Pelagic -parts- & grannahoyring, samb. § 18, stk. 1 í fyrisitingarlógini, við atliti til bygging á havnalagnum |
| 79/24 | 22/00491-2 | Varðin Pelagic -umsókn um byggiloyvið til Protein & Lýsiverksmiði |
| 80/24 | 24/00349-1 | FÆ2024 -Eykajáttanir flytingar millum íløgur og rakstrarstøð |
| 81/24 | 24/00314-2 | Bilur til umsitingina |
| **Til kunningar** | | |
| 25/24 | 24/00004-1 | Skattatøl 2024 |
| 26/24 | 24/00340-2 | Kommunufelagið hoyringarskriv: Uppskot til Kunngerð um útrokning av umsetningi í kappingarlóggávuni er komið til ummælis. |
| 27/24 | 24/00329-2 | Kariesskrásetingin 1991-2023 |
| | | |

Kristin Michelsen, borgarstjóri setur fundin, lesur skránna til fundin í dag og spyr um viðmerkingar eru til skránna –Ongin viðmerking.

**Til støðutakan**

## 75/24
## 24/00261-3 Sjógøta 2. -Útskifting av gomlum oljufýri til jarðhita - nýggj orkuloysn til upphiting í Posta bygninginum - Tvøroyrar kommuna og Føroya Banki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 28.11.2024 | 70/24 |
| 2 Býráðið | 06.12.2024 | 75/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 21.11.2024**
Mælt verður til at taka undir við tilmælinum hjá Føroya Banka, at skifta oljufýr og ketil í felags bygninginum á Sjógøtu 2,. við varandi orkuskipan grøna orkuskipan.

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:** PBC ráðgevi, hevur meting um eina sparing á uml. kr. 61 tús./ár, u/MVG, við verandi olju- og elprísum, um skift verður frá oljukyndum katli til el-rikna jarðhitapumpu. Íløgu kostnaðurin fyri Tvøroyrar kommunu verður áleið kr. 600 tkr.

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 28. november 2024:**
Einmælt samtykt at skifta oljufýr og ketil í felags bygninginum á Sjógøtu 2, við varandi orkuskipan grøna orkuskipan, sum verður fíggja av FÆ2024 §609 íløga til, og írestandi við eykajáttan av innistandandi. Málið verður beint í býráðið og skal hava tvinnar viðgerðir.

**Býráðið 06. december 2024:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Fíggjarnevndini og umsitingini at skifta oljufýr og ketil í felags bygninginum á Sjógøtu 2, við varandi grøna orkuskipan, sum verður fíggja av FÆ2024 §609 íløga til, og írestandi við eykajáttan av innistandandi. Málið skal hava tvinnar viðgerðir.

**76/24**

**24/00341-2 Uppskot til ummælis um Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 28.11.2024 | 81/24 |
| 2 Býráðið | 06.12.2024 | 76/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 15.11.2024**
Kommunufelagið hevur sent Tvøroyrar kommunu hoyring**:** *"Uppskot til ummælis um Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum"*

**Lógargrundarlag:**
Uppskot til løgtingslóg um Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:**
Kommunustjórin mælir til, at Tvøroyrar kommuna umrøður og viðgerð hvørt tunnilsgróti kann gagnnýtast til verkætlanir í kommununi, og at kommunan fyriheldur seg til íbinding og vegaføring frá tunnilsmunnanum við nýggja Hvalbiartunnilin til Trongisvági.

Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 28. november 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað, einmælt samtykt at beina málið í býráðið.

**Býráðið 06. december 2024:**
Borgarstjórin mælir býráðnum til at taka undir við verandi uppskotið til løgtingslóg um Suðuroyartunnil, og at almenna partafelagið «P/F Suðuroyartunnilin» verður byggiharri fyri alla verkætlanina. **-Einmælt samtykt**

Borgarstjórin biður eisini um heimild at samráðast við allar kommunur í Suðuroynni at velja umboð í ein fylgibólk, ið hevur sum høvuðsendamál at fyrireika og gera Suðuroynna klára til ein Suðuroyartunnil.
**-Einmælt samtykt**

**77/24**

**24/00283-3 BVT -Barnaverndartænastan -eykajáttan 2024**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 17.10.2024 | 25/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 31.10.2024 | 62/24 |
| 3 Býráðið | 07.11.2024 | 69/24 |
| 4 Býráðið | 06.12.2024 | 77/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 13. Oktober 2024**
Umsitingin hevur móttikið teldupost frá leiðaranum av Barnaverndartænastuni fyri Suðuroy, ið boðar frá, at BVT tørvar eykajáttan til raksturin 2024. Við teldupostinum er frágreiðing til um virksemið hjá BVT, orsøkina til tørv á eykajáttan fyri 2024 við yvirlit av kostnaðar býtinum fyri hvørja kommunu sær í Suðuroynni.

Tvøroyrar kommuna veitur 38,34% av kostnaðinum av BVT, svarandi til kr. 148.612,- av eykajáttanini fyri 2024.

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg um barnavernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 30 frá 26. mars 2021 (Barnaverndarlógin)

**Fíggjarligar avleiðingar:** Eykajáttan fyri FÆ2024

- *TVK hevur samlaða játtan á kr. 3,359 mió. til BVT í FÆ2024 samsvarandi 38,34% av rakstrinum fyri BVT (Býtislykilin er eftir fólkatalinum)*

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Sosialunevnd og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Sosiala nevnd 17. oktober 2024:**
Sosiala nevnd mælir einmælt til at veita eykajáttan til Barnaverndartænastuna, samsvarandi frágreiðing frá leiðaranum av barnaverndini og samb. viðgerð á stýrisfundi 10. oktober 2024. Mælt verður til at játtanin verður veitt av innistandandi. -Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 31. oktober 2024:**
Fíggjarnevndin tekur einmælt undir við tilmælinum hjá sosialu nevnd at veita eykajáttan til Barnaverndartænastuna, samsvarandi frágreiðing frá leiðaranum av barnaverndini og samb. viðgerð á stýrisfundi 10. oktober 2024. Mælt verður til at játtanin verður veitt av innistandandi. -Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 07. november 2024:**
Býráðið tekur einmælt undir við tilmælinum hjá sosialu nevnd og fíggjarnevndini at veita eykajáttan til BVT Barnaverndartænastuna. Málið skal hava tvinnar viðgerðir.

**Býráðið 06. december 2024:**
Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**78/24**
**24/00094-7 P/F Varðin Pelagic -parts- & grannahoyring, samb. § 18, stk. 1 í fyrisitingarlógini, við atliti til bygging á havnalagnum**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 06.05.2024 | 26/24 |
| 2 Tekniska nevnd | 12.06.2024 | 33/24 |
| 3 Tekniska nevnd | 04.12.2024 | 45/24 |
| 4 Vinnu- og havnanevndin | 04.12.2024 | 38/24 |
| 5 Býráðið | 06.12.2024 | 78/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 22.04.2024**
Tvøroyrar kommuna sendi hin 26. mars íalt 54. parts- og grannahoyringarskriv til borgarar, ið mett verður hava tørv á at verða parts -og grannahoyrnir, í samb. við byggimálsviðgerðina av ætlaðu bygging hjá P/F Varðin Pelagic av protein- og lýsuverksmiðju á havnalagnum á Tvøroyri. Við hoyringarskrivinum var frágreiðing til ætlaðu bygging, samt viðkomandi tekningar til verkætlanina.

**Hoyringarskrivið hjá Tvøroyrar kommunu varð orðað:**

*Við hesum verður kunnað um, at P/F Varðin Pelagic hevur hin 29. desember 2022 søkt um byggiloyvi til protein- og lýsuverksmiðju á havnarlagnum á Tvøroyri, ið Tvøroyrar Býráð ætlar at geva byggiloyvi til, treytað av at øll onnur myndugleikaloyvir verða givin til verkætlanina.*

*Hetta hoyringarskrivið snýr seg um ítøkiligu byggiverkætlanina hjá P/F Varðin Pelagic, og verður sent eigarunum av ognum í grannalagnum.*

*Kunnað verður um at Tvøroyrar býráð hevur hin 20. februar 2023 samtykt at broyta byggisamtyktina fyri økið, har ætlanin er at byggja. Í hesum sambandi hevur býráðið ásett, at goymslubrunnar kunnu í mesta lagi vera 20 m høgir, og skorsteinar í mesta lagi vera 60 m høgir. (P/F Varðin Pelagic søkti upprunaliga um loyvi til at byggja 30 metrar goymslubrunnar).*

*Tvøroyrar býráð hevur hin 25. juli 2023 samtykt, at geva P/F Varðin Pelagic loyvi til at fremja útfylling á uml. 8.000 m2 eystan fyri verandi virkisbygningin hjá felagnum, har goymsluhøll og atløgubryggja skal byggjast, við treyt frá Tvøroyrar kommunu um, at fjøran og atkoman til neystini skal varðveitast. Eisini skal P/F Varðin Pelagic útvega øll myndugleikaloyvir til verkætlanina, har í m.a. loyvi frá Umhvørvisstovuni, ið kann lesast á www.us.fo.*

*Eftirsum at aðrar hoyringar hava verið viðv. somu byggiverkætlanini, er viðheft yvirlit yvir hesar hoyringar, eins og viðkomandi umsóknartilfar frá P/F Varðanum Pelagic.*

*Møguligar viðmerkingar skulu verða Tvøroyrar kommunu í hendi seinast mánadagin 22. apríl 2024 kl. 15:00, og skulu hesar sendast til: Tvøroyrar kommuna, Tvørávegur 37, 800 Tvøroyri. Eisini ber til at senda viðmerkingar til teldupost: tvoroyri@tvoroyri.fo*

**Viðmerkingar/orsøk til parts- og grannahoyring:**

Tá kommunan *sum byggimyndugleiki* viðger eina umsókn um loyvi til bygging, eigur kommunan, áðrenn hon tekur støðu til umsóknina, at kanna hvør er granni í mun til byggingina, og um nakar granni kann roknast sum partur í málinum.

Hetta skal gerast, so kommunan kann taka støðu til, um neyðugt er at fremja hoyring av grannum ella pørtum í málinum, og fyri at hoyringin verður framd á rættan hátt og eftir røttu reglum. *T.v.s. eftir ásetingunum í almennu byggisamtyktini hjá Tvøroyrar kommunu, bygningskunngerðini og ella eftir fyrisitingarlógini.*

Um grannin bert er at rokna sum granni, ella hvørt grannin evt. eisini er partur í málinum, er avgerandi fyri, hvat viðkomandi kann kunnast og hoyrast um, og í hvønn mun viðkomandi hevur rætt til innlit í byggimálið, og hvørji onnur rættindi viðkomandi hevur t.d. til at fáa grundgeving og rættin til at kæra.

**Hoyringsskriv:**

Send vóru íalt 54 hoyringarskriv og innkomin eru 5 svar. Eitt av innkomnu hoyringarsvarum er frá donskum adv. sum m.a. hevur fráboða ynskið um longda freist at svara: *"det skal indledningsvist nævnes, at dette høringssvar er foreløbigt. Der er anmodet om dansk over-sættelse af relevant færøsk lovgivning hos den færøske Rigsombudsmand, hvilket Rigsombudsman-den, ikke har kunnet nå at imødekomme inden fristen for dette høringssvar. Der tages derfor ud-trykkeligt forbehold for at komme med flere bemærkninger når vi har haft lejlighed til at sætte os ind i de relevante færøske lovbestemmelser.*
***Vi anmoder Kommunen om at afvente med at træffe afgørelse i sagen, til vi har haft mulighed for nærmere at gennemgå sagens materiale og relevant færøsk lovgivning samt indgivet supplerende bemærkninger til sagen.***

**Viðmerking kommunustjórin: Vegleiðing til freistir og ummælir:**

Myndugleikin kann áseta eina freist fyri, nær ummælið ella viðmerkingar frá partinum skulu gevast myndugleikanum. **Freistin eigur at vera sett soleiðis, at parturin fær eina rímiliga tíð til at seta seg inn í upplýsingarnar og hugsa um, hvat er at gera. Biður parturin um longda freist, eigur umbønin so vítt gjørligt at verða eftirlíkað.** Tað kunnu tó vera umstøður, har tað ikki ber til at leingja freistina. Í slíkum føri eigur myndugleikin at kunna partin um, at um viðmerkingar hansara ikki eru móttiknir innan ávísa freist, tekur myndugleikin avgerð, tá freistin er farin.

**Lógargrundarlag:** Fyristitingarlógin og bygningslógin

**Til støðutakan hjá Tvøroyrar býráð er:**

At leingja freistina at svara uppá partshoyringarskrivið, og tilmælið um, at innkomin parts- og grannahoyringarskriv verða tikin við og viðgjørd saman við byggimálsviðgerðin av umsóknini frá P/F Varðin Pelagic um loyvið til at byggja lýsi- og protein verksmiðju á Tvøroyri.

**Býráðið 06. maj 2024:**

Borgarstjórin mælir býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá kommunustjóranum, um at leingja um svar freistina uppá parts- og grannahoyring frá verandi 22. apríl, til ístaðin týsdagin 7. maj 2024. - **Einmælt samtykt.**

Borgarstjórin mælir býráðnum til at samtykkja, at innkomin parts- og grannahoyringarskriv verða tikin við og viðgjørd saman við byggimálsviðgerðin av umsóknini frá P/F Varðin Pelagic um loyvið til at byggja lýsi- og protein verksmiðju á Tvøroyri. **-Einmælt samtykt.**

**Tekniska nevnd 12. juni 2024:**
Nevndin er kunnað um hoyringsskrivini, sum eru komnar frá grannunum. Nevndin hevur ikki broytt støðu viðvíkjandi ætlanunum um at geva byggiloyvi til virkið, við ætlaðu staðsetingini. Viðmerkjast skal, at Eyð Jóna Eidesgaard var ikki partur av viðgerðini av hesum málinum.
**Kommunustjórin 21. november 2024**
Tá freistin var farin at lata inn svar uppá hoyringarskriv, ið vóru sent til 54 móttakarar, hevði kommunan móttikið í alt 5. hoyringarsvar. Tvey av hesum hevði onki mótmæli, meðan 3. teirra innihildu mótmælir, átalur og uppskot til broytingar til ætlanina.

Umsitingin hevur valt ikki at navngeva persónarnar aftan fyri 2 av hoyringarsvarum, og verða hesi ístaðin nevnd sum «A» og »B».

Hoyringarsvar við mótmælum
Lundgrens adv. umboðandi Livilig Kor á Tvøroyri, hoyringarsvar «A» og hoyringarsvar «B» mótmæla og leggja fram ynskir um broytingar í ætlanini hjá PF. Varðanum Pelagic, at byggja protein og lýsuverksmiðju á havnalagnum á Tvøroyri.

Hoyring hjá PF. Varðin Pelagic av hoyringar svarum
Kommunan hevur valt at senda innkomnu hoyringarsvar, til hoyringar og viðmerkingar hjá PF. Varðin Pelagic hin 13. juni 2023.

Hoyringarsvar frá PF. Varðin Pelagic
PF. Varðin Pelagic hevur sent Tvøroyrar kommunu svar hin 10. juli 2024, við viðmerkingum til tey 3 hoyringarskrivini, ið mótmæla og ynskja broytingar í ætlanini hjá Varðanum Pelagic, at byggja protein og lýsuverksmiðju á havnalagnum á Tvøroyri.

Kontrahoyring
Kommunan hevur eftirfylgjandi gjørt av at kontrahoyra tey trý, ið hava latið mótmælisskriv, við at senda teimum upplýsingarnar og viðmerkingarnar hjá PF. Varðanum Pelagic dagf. 10. Juli 2024.
Kommunan skrivar ma. til teirra: «*Um tygum hava møguligar viðmerkingar til svarið hjá P/F Varðin Pelagic uppá títt hoyringarskriv, skulu hesir verða Tvøroyrar kommunu í hendi seinast ónsdagin 24. juli 2024 kl. 15:00, og skulu hesar sendast til Tvøroyrar kommunu*»

Lundgrens adv. hava svara kommununi, at í fyrsta umfari er teirra ynskið um longda freist til hin 9. aug. 2024, at svara uppá kontrahoyringarskrivið, sum verður játta av kommununi.

**Umsitingin hjá Tvøroyrar kommunu -niðurstøða 1:**
Umsitingin hevur eftir 9. august viðgjørt tey trý innkomnu mótmælini og kontrahoyringarsvarini, sum í mestan mun eru tengd at umhvørvisgóðkenningini, og viðgjørd av Umhvørvisstovuni. Niðanfyri eru úrdráttir úr innkomnum hoyringar- og kontrahoyringarsvarum, ið eru viðløgd sum fylgiskjøl í málinum í fullum líki og navngivin.

***

**Hoyringarsvar og viðmerkingar**

**24/00094-3_Mótmælið «A» , dagf. 10.04.2024:**

A. Eftir mínum tykki er staðsetingin av ætlaðu byggingini heilt skeiv. Bæði núverandi og ætlaða bygging áttu at ligið á ídnaðarøkinum hinumegin fjørðin. Eg mæli til at flyta alt yvirum á nevnda ídnaðarøki.
B. Og so skorsteinurin - eg skilji ikki, hví útlátið úr hesum ikki verður í rørum leitt út á streymasjógv. Vildi hildi, at tøknin var komin longri, nú vit skriva 2024.

**24/00094-17_Viðmerkingar hjá PF. Varðin Pelagic dagf. 10. Juli 2024 til hoyringarsvar frá mótmælið «A» .**

A. Varðin Pelagic fer ikki at flyta virkið yvir um fjørðin. Tað ber heilt einfalt ikki til.

   *Varðin Pelagic er tilvitandi um, at staðsetingin av nýggju framleiðsluni nær bústaðarøki á Tvøroyri er umstrídd. Stór atlit eru tí tikin í ætlanini, soleiðis at nýggja virksemið ikki skal vera til ampa. Seinasta tillagingin, sum er gjørd, er at flyta nýggju keiina útfrá, soleiðis at neystini og fjøran verða varðveitt. Tað, sum er avgerðandi fyri Varðan Pelagic, og høvuðsorsøkin til staðsetingina, er synergieffektin millum núverandi framleiðslu og nýggju protein- og lýsi framleiðsluna. Onnur staðseting enn tann ætlaða hevði ført við sær, at flutningur av restrávøru frá verandi virki til annað stað hevði hildið fram, við tí missi í góðskuni, sum tað viðførir, umframt stórar eyka kostnaðir fyri felagið fyri t.d. nýggjan virkisbygning, fólkafasiliteter, bryggju o.a.*

B. Varðin Pelagic hevur fingið uppskot frá borgarum um aðrar loysnir enn at hava skorstein. Varðin Pelagic hevur sent uppskot frá borgarum til ummælis hjá uttanhýsis serfrøðingum. Varðin Pelagic hevur eisini leitað við lummalykt eftir alternativum til skorsteinin. Tað er serfrøðin í vinnuni, sum hevur sagt Varðanum Pelagic, at besta og rættasta loysnin er ein skorsteinur.

**24/00094-24_Kontrahoyringarsvar frá mótmælið «A»  dagf. 24. Juli 2024**

Eg vil eisini hesaferð, nú møguleiki er, gera viðmerking til svar, ið Varðin Pelagic hevur sent kommununi"

A. "Tað ber heilt einfalt ikki til" at flyta virkið yvirum á ídnaðarøkið, verður sagt. Vit plagdu at siga, at har viljin er til staðar, ber alt til.
B. "Tað er serfrøðin í vinnuni, sum hevur sagt Varðanum Pelagic, at besta og rættasta loysnin er ein skorsteinur". Gjøgnum tíðina hava vit so mangan hoyrt, at serfrøðin tók feil.
C. Hoyring svar "A" viðmerkir í kontrahoyringssvarinum at: Tað er rætt at "søguliga sæð hevur fiskaarbeiði verið á havnalagnum á Tvøroyri í meira enn 100 ár, og at býurin er vaksin út frá hesum virksemi". Býurin er vaksin heilt nógv, og býarplanur gjørdur, har ídnaðurin fekk ávíst øki hinumegin fjørðin. Er tíðin ikki komin til at rætta upp tað, ið vit kunnu gera betur?

***

**24/00094-5_Hoyringarsvar frá mótmælið «B», dagf. 22.04.2024**

Byggiætlan:

A. Vit vilja átala, at frágreiðingin um verkætlanina ikki ítøkuliga samsvarar við tekningarnar. Hetta er eisini galdandi frágreiðingina og tekninginarnar til Umhvørvisstovuna, sum víst verður á í brævinum fra kommunini. Harumframt vera 4 lýsitangar bert nevndir í umsóknini til umhvørvisstovuna, men eksistera ikki á tekningunum. Hvar skullu teir vera? Upplysningarnir skapa forvirring, geva og vísa ikke eina ÍTØKILIGA byggivætkætlan.

A2. Á keiøkinum á norðursíðuni , kloss upp at búðstaðarøkinum er planlagt at leggja

- Transformarastøð,
- Kemikaliegoymslu,
- Oljutanga (40.000L) við rørum,
- Orkumiðstøð við dampframleiðandi ketlum
- Ein skortstein 60 m høgan.

Skorsteinur:

B. Á tekningunum er ein 60 m høgur skorsteinur + fundament staðsettur. Skorsteinurin og fundamenti liggja undir brekkuni, 35 metrar frá okkara húsum. Skorsteinurin og fundamenti liggja kloss upp at grænsuni millum núverandi kaiøki og bústaðarøki. Hesin skorsteinur er ein ampi og ein sikkerheits risiko fyri okkara hús , grannar og fólk. Um skorsteinurin av ein ellari aðari orðsøg koppar, er tað ca 50 % sannlíkt at skortsteinurin dettur niður yvir eitt ella fleiri sethús. Hoyringarsvar «B» mæla til at: Placeringin av skorsteininum skal flytast yvir um til suðursíðuna av virkinum. Sama er við ketilrúm/orkumiðstøð við dampframleiðandi ketlum og oljutangi nattúrlig hoyra til skorsteinin fylgja tey við yvir á suðursíðuna.

Dampkókari og larmur:

C. Dampkókararnir sum eru serliga tiltiknir fyri at larma illa og skapa ristingar í umhvørvinum og vilja skapa stórt árin á nærumhvørvi. Placeringin á helluna ella upp ímóti helluni og kloss upp at búðstaðarøkinum ger tað ikki bedri.

D. Varðin Pelagic meinar at onkin larmur kemur fra orkumiðstøðini/ ketlinum, tí teir vilja seta eina nýggja teknologi upp. Tað er bert ein meining og ikki eitt prógv. Staðsetingin av transformararúmi og kemikaliiegoymslu kloss uppá búðstiarøki og á grænsuni ímillum kajøki og búðstarøki skapar ampa og árin.

Tilmælið frá Hoyringarsvar «B»: At staðseta hesar á nýggja parkeringsøkinum, sum er planlagt eystanfyri goymslubygningin og parkeringsplássini verða flutt á grænsina ímillum kaj og búðstaðar øki, har tey 3 nestini standa, har gamla FSR neystið liggur og undir brekkuna.

Hæddir og goymslutangar:

E. Fýra goymlsutangar á 20 metra hædd skulu standa á sunnari síðu av tí høga bygninginum og teir fylla eina longd uppá einar 55 metur fram við bygninginum og frammanfyri okkara hús. Vit ynskja at hesir tangar ikki koma upp um takið á bygninginum, tá teir annars vilja taka útsýni enn og meira enn bygningurin ger.

Goymslubygningur:

F. Varðin Pelagic skrivar í verkætlanini at teir hava tikið hensyn til grannar við at gera nýggja goymslubygningin lágan (7 metur) so hann ikki kemur upp fyri grannar. Tað er flott. Eisini siga teir at teir 4 lýsitangarnir (7 metur) sum helst fara at verða staðsettir sunnanfyri bygningin ikki koma upp um taki. Tað er gott. Í forlongilsi av hesum góðvilja vildi tað veri hóskandi at hildi tangarnar undir takhædd, evt. við at koyra teir niðurefter ella hava fleiri lágar tangar ella hvat loysn nú kann finnast.

Ljósdálking:

G. Vit ynskja at gera viðmerkingar við ljósdálking á núverandi og planlagda virkinum og goymslubygninginum. Ein partur av klædninginum er pyntiljós á, ið kunnu skiftast til nógvar litir. Hetta er vakurt at líta á fyri flestu borgarar á Tvøroyri, sum búgva langt nokk vekk frá kaiini ella koyra forbí. Tað er eisini vakurt fyri tey

flestu at síggja virki fra Líðuni av. Men av tí at virkið er staðsett so tæt við nærmastu grannar, verður tað til árin fyri nærmasta umhvørvi.
Uppskot/ynskið frá Hoyringarsvar «B»: At ljósini á bygninginim á norðursíðuni eru sløkt og at fasadan á evt komandi bygningum einki lita ljós hava á norður síðuni.  Vit ynskja at goymslu bygningurin ikki verður bygdur við yvir ljósi. Ti øll hesu ljósini eru ljósdálking fyri tað nærmasta búðøki. Sjálvandi skulu arbejdsljós og gangi ljós verða á bygninginum, men lýsa niður eftir so tey gera gagn og ikki ljósdálka og brúka óneyðuga orku.

## Larmur frá skipum

H. Vit vilja gera viðmerking til tann komandi økta skipsferðsluna. Longu nú eru árin fra skipum, ið liggja við við kai. Árinini eru ljóðdálking fra ljósmotorum og ljósdálking frá teimu flestu skipinum í liggja við kaiina. Umhvørvi nærmast við keiðuna hava árin av hesum dálkingum. Vit skrivað 2024 og ljósmotorar áttu ikki at vera i gongd, tá skipini liggja við kai, og ljós á skipunum skulu bert vera til arbeiðsbrúk har ljósið lýsir niður á arbejðsøki og ikki á nærumhvørvi ella býin. Krav má setast, so hetta verður framtíð.

## Ábyrgd og trygd:

I. Varðin Pelagic og kommunan hava skerpa ansvar fyri at tryggja nátturuna og umhvørvi, sum eisini er bústaðarøki og fólk. Vit halda at Varðin Pelagic hevur eitt ekstra skerpa ansvar fyri sikkurheitini fyri umhvørvi og fólk, tí at ein ólukka longu hevur verið á virkinum, har tað heldigvís var ættin henda dag og eitt hartarbeiðandi sløkkilið á landi og sjógvi, ið gjørdi at nærmasta grannalag ikki brendi í grund og folk lótu lív.

**Viðmerkingar frá PF. Varðin Pelagic dagf. 10. Juli 2024 til hoyringarsvar frá Hoyringarsvar «B». (24/00094-17)**

## Byggiætlan:

A. Tað er einki óvanligt í at gera tillaðingar í verkætlanunum – t.v.s frá skitsuverkætlan og til endalig verkætlan fyriliggur. Hetta kemur serliga fyri, tá verkætlanir eru so stórar sum hendan. T.d eru Lýsitangarnir eru ikki partur av umsóknini um byggiloyvi. Tann umsóknin kemur seinni, men ætlanin er, at lýsitangarnir blíva staðsettir niðanfyri frystihøll 1. Hæddin á tangunum er smbr. treytunum í byggisamtyktini (í mesta lagi 11,5 m).
   a. A2. Viðmerking VP: Rúmini eru úr betong og skulu byggjast inn í lendi við flagtekju omaná. Oljutangin skal eftir ætlan leggjast niður í kaiina.

## Skorsteinur:

B. Tað eru sera strong krøv til slíkar skorsteinar. Teir eru plaseraðir í høgum konsekvensklassa. Hetta merkir m.a., at: • Nógv eyka trygd er løgd afturat konstruktiónunum. • Allar útrokningar skulu gjøgnumgangast og góðkennast av konstruktiónsráðgevum, ið einki hava við ætlanina at gera annars. t.e. 3. parts kontroll
   a. Staðsetingin á suðursíðuni hevur verið uppi at venda, men henda loysnin letur seg ikki gera orsakað av tekniskum ásetingum til ætlaðu framleiðsluna og logistikkin hjá virkinum. Ráðgevarar hjá okkum halda, at tað er ein tryggari loysn at halda fast í verandi staðseting, orsaka av at undirlendið er fastari.

## Dampkókari og larmur:

C. Varðin Pelagic hevur saman við ráðgeva innan ljóð, Steingrund Akustik, gjørt ljóðkanningar og ljóðsimuleringar soleiðis, at Varðin Pelagic ikki kemur at hava óvæntaðar óljóðskeldur. Bygningurin verður bygdur við ljóðdoyving í trá við ljóðkanningarnar, soleiðis, at óljóð frá framleiðsluni ikki hoyrist úti.

D. Í mun til trygd, er tað best at staðseta transformarnar í ein betongbygning niðan móti brekkuni/inni í lendinum. Kemikaliugoymslan verður bygd eftir forskriftunum fyri tílík rúm og kemur at lúka galdandi treytir á økinum. Innrættingin av kemikaliugoymsluni verður soleiðis, at óviðkomandi ikki hava nakra atgongd – og einki útlát skal kunna vera frá goymsluni til umhvørvið. Tað vil siga, at har verður uppsamling, um ein leki skuldi komi á ein tanga. Kemikalii, sum Varðin Pelagic kemur at brúka, eru reingerðingarevni. Kemikaliuni verða goymd í upprunaíløtum, sum í flestu førum eru í IBC tangum upp til 1000 litur (við merking á). Nøgdin av kemikalium á goymslun kann verða 2-3 IBC-tangar av hvørjum slagi til cip-vaskingina (NaOH og HNO3), ein tanga til vasking av núverandi virki (Foam 235) og ein tanga til sóttreinsing (Des Foam PAA).

## Hæddir og goymslutangar:

E. Ein útgreining av framleiðslu- og logistikkviðurskiftum vísir, hvussu stóran goymslukapacitet VP tørvar. Til hetta krevst fýra goymslutangar (siloir). Tað ber ikki til at uppseta fleiri lægri tangar á økinum. VP leggur seg eftir at fáa fótin á silotangunum so langt niður í lendi sum til ber fyri at minka mest møguligt um sjónligu hæddina upp um verandi virkisbygning. Hæddin kann í mesta lagi vera 20 metrar samb. áseting í byggisamtyktum fyri siloir á havnalagnum. Viðfestu tegningarnar vísa hæddina á tangunum.

## Goymslubygningur og ljós:

F. Goymslubygningurin skal eftir ætlan sprinklast har vit binda í vernandi sprinklaraskipan. Tí skulu vit ikki hava nógv yvirljós til brandventilatión. Um vit seta okkurt roykop í bygningin kunnu hesi gerast við lúkum og ikki við klárum plátum. Har er bara neyðugt at hava orienterigsljós uttan um bygningin. Á kaisíðuni er arbeiðsljós, tá arbeiði er á kaiini. Ljós generelt á bygningi og kring bygningar vilja vit fara at endurskoða, so at vit tryggja, at ljósið ikki lýsur ov sterkt og í minsta mun forstýrar grannar og onnur.

## Ljósdálking:

G. Vit hava tosað við tekniska leiðaran hjá Varðanum um at fáa innført, sum fasta mannagongd á skipunum hjá Varðanum, at ljós ikki verður brúkt óneyðugt. Tað verður brúkt sum arbeiðsljós og annars sløkt. Hann

lovaði, at hann skuldi fáa hetta innført á skipunum hjá Varðanum. Her kunnu vit á Varðanum Pelagic so eisini halda eyga við, um ljósini standa tendrað alla tíðina ella um teir hava minst til at sløkkja tey. Vit eru ikki vitandi um, at ljós, frá øðrum enn fiskiskipum, hava verið til ampa.

## Larmur frá skipum:

H. Viðvíkjandi landstreymi, so er hendan loysn ikki so einføld, av tí, at nótaskipini hava so stóran orkutørv. Enn er ongin skipan, sum er stór nokk til hesi skip. Harumframt vil ein skipan til landstreym ikki passa til øll skip. Tí hevur reiðaríið Varðin heldur brúkt orku upp á loysnir til at ljóðdoyva síni skip, og tað við góðum úrslitum. Skip, sum hava fingið ljóðdoyving, hava ikki elvt til ampar av ljósmotorum hjá grannum á Tvøroyri. Kaiin á Tvøroyri hevur annars landstreym, og landstreymur verður brúktur av teimum skipum, har tað ber til.

## Ábyrgd og trygd:

I. VP upplýsir at tá virkið bleiv bygt uppaftur í 2017, bleiv tað bygt eftir nýggjastu byggireglunum. Framleiðslubygningurin er bygdur í 15 brandsektiónum. Um eldur er onkrastaðni, so kann eldur í ringasta føri spreiða seg til tvær brandsektiónir. Ein rakstrar-og viðlíkahaldsætlan er gjørd yvir allar trygdarskipanir. Uppgávurnar at viðlíkahalda og servisera, hjá bæði internum fólki og eksternum veitarum, er lagt inn í eina viðlíkahaldsskipan, sum skal tryggja, at allar skipanir til eina og hvørja tíð rigga. Á virkinum er ABA við tilhoyrandi skipanum: sprinklara (AVS), roykop (takvindeygu, ið opna) og roykventilatión (ABV), brandhurðar (ABDL), brandlemmar undir lofti og í veggum, køvingaskipan (ARS), ammoniakkalarmar, sirenuljóð og høvuðs el-talvur á virkinum. Um eldur ella roykur er á virkinum, fer sjálvvirkandi brunaskipanin (ABA) í gongd, sum alarmerar tilbúgving og ávarar øll starvsfólk og gestir á virkinum.Varðin Pelagic hevur sína egnu tilbúgvingarætlan og eitt lið av útbúnum hjálpiroykkavarum. Harumframt hevur stórur partur av starvsfólkunum skeið í grundleggjandi eldsløkking og fyrstuhjálp.

**Kontrahoyringarsvar frá Hoyringarsvar «B».**

Ongar viðmerkingar til viðmerkingar hjá PF. Varðanum. Tó verður kært um at kommunan hevur sent navngivið hoyringarskriv til viðmerkingar hjá PF. Varðin Pelagic.

***

**24/00094-25_Hoyringarsvar frá Lundgrens adv. vegna Livilig Kor, dagf. 08.08.2024.**

*Lundgrens adv. hevur sent hoyringarsvar til Tvøroyrar kommunu, Føroya Løgmaður, Landstýriskvinna í Umhvørvismálum, Umhvørvisstovan, Overfredningsnævnet.*

1.

Lundgrens adv. skriva at: Jeg afgiver dette høringssvar på vegne af Foreningen Livilig Kor og på vegne af de naboer i bolig-området, der grænser direkte op til P/F Vardin Pelagic's byggeprojekt, som med adresseangivelser er angivet i mit foreløbige høringssvar af 22. april 2024, der vedlægges som kopi til dette endelige høringssvar.

I høringssvaret vil jeg gengive konkrete høringsbemærkninger fra de stærkt berørte naboer, herunder fra ledelsen og medlemmerne af Foreningen Livilig Kor. Der er tale om en lovligt etableret og registreret forening med separat CVR nummer. Foreningens formål er at hindre udvidelse, omfattende ændringer og etableringen af en stærkt forurenende og direkte farlig fiskefabrik beliggende midt i et boligområde, og med afstande visse steder på blot 50 meter til boligejendomme, hvori der bor familier med børn.

Jeg vil i forbindelse med høringssvaret fremkomme med en række retlige betragtninger baseret på færøsk lovgivning som jeg forstår den og baseret på miljø- og planretlige principper af almen karakter.

Søgsmål mod de godkendende myndigheder vil i givet fald kunne igangsættes uden forudgående administrativ rekurs ved de relevante retlige instanser, jf. herved grundlovens § 63, stk. 1.

Bestemmelsen indebærer, at grundlovens § 63, stk. 1, også finder anvendelse på Færøerne.
Det skal for fuldstændighedens skyld nævnes, at grundloven indeholder en række bestemmelser, der giver mulighed for at fravige visse grundlovsbestemmelser, herunder for Færøernes vedkommende, jf. herved grundlovens § 31, stk. 5, § 48, stk. 8, § 71, stk. 3, og § 86.

Disse muligheder for fravigelse, herunder i relation til det færøske selvstyre, er ikke relevante i relation til den grundlovssikrede søgsmålsadgang.
Jeg skal i denne indledning særligt fremhæve, at det følger af helt grundlæggende planretlige principper, at den planretlige regulering har som et absolut hovedformål at hindre en situation som den i denne sag foreliggende, nemlig en absolut uhensigtsmæssig og personfarlig placering af en stærkt forurenende og stærkt risikoeksponeret virksomhedstype direkte op ad boligejendomme.
Den planretlige regulerings hovedformål er således at holde industriformål af forurenende og risikomæssig karakter skarpt adskilt fra såkaldt "følsom anvendelse", herunder navnlig boliganvendelse.
Det er netop derfor, lokalisering spiller en vigtig rolle i al planretlig regulering og myndighedsmæssig godkendelsesvirksomhed.
Myndighederne skal i henhold til planretten adskille farlig og forurenende virksomhed fra følsom anvendelse. Dette sker som regel ved, at farlige og forurenende virksomheder placeres i industriområder langt borte fra boliger, børneinstitutioner og anden følsom anvendelse.
Det projekt, som kommunen overvejer at meddele tilladelse til, udgør således en meget alvorlig krænkelse af de her beskrevne forhold.
Det forekommer derfor indlysende, at enhver ansvarlig myndighed har pligt til at sikre, at der ikke sker nyanlæg, udvidelser, ændringer eller meddeles fortsatte tilladelser til farlig og stærkt forurenende aktivitet direkte op mod et meget nærliggende boligområde.
Jeg er naturligvis klar over Færøernes særlige retstilstand i relation til den Europæiske Union, og dermed i forhold til den EU-retlige regulering.
Jeg skal derfor indskrænke mig til at referere til det såkaldte Seveso III direktiv, der er implementeret i Miljø- og Fødevareministeriets bekendtgørelse nr. 372 af 25. april 2016 om kontrol med risikoen for større uheld med farlige stoffer ("Risikobekendtgørelsen").
I relation til denne regulering, der ikke er direkte gældende på Færøerne, men som dog bør være retningsgivende for færøske myndigheder, fremhæver jeg, at der historisk har været en meget alvorlig brandhændelse på netop den berørte virksomhed. Hændelsen har indebåret risiko for direkte livsfare for de nærtboende borgere.

Jeg fremhæver i så henseende, at jeg har modtaget oplysninger om, at der på virksomheden, til brug for køleformål, opbevares meget store mængder ammoniak. Jeg har i mit virke som miljøretsadvokat været i berøring med en række lignende sager.
Ved udslip af ammoniak, eksempelvis i påkørselstilfælde, brandtilfælde, naturkatastrofer eller lignende vil ammoniakudslip resultere i dannelse af giftige og absolut farlige gasser med en meget stor spredningsradius og med mulig dødelig virkning.
Jeg har på mine klienter forstået, at man forsøger at mitigere ved placering mod kysten og ved udledning af ammoniak til havmiljøet i tilfælde af brand eller andre katastrofer.
Jeg er ikke bekendt med, hvorvidt der foreligger udførlige risikovurderinger vedrørende disse forhold, men jeg vil kraftigt indskærpe overfor de godkendende myndigheder, at der i modsat fald tilvejebringes sådanne risikovurderinger udarbejdet af certificerede eksperter.
Jeg vil nedenfor nærmere gennemgå en række af de retlige forhold nærmere.

2.

HØRINGSSVAR FRA NABOERNE (Sama sum hoyringssvar "B"), DER TILLIGE ER MEDLEMMER AF DEN HØRINGSBERETTIGEDE FORENING LIVILIG KOR
Jeg refererer nedenfor høringssvaret i den oprindelige færøske udgave ledsaget af en uautoriseret oversættelse til rigsdansk

3.

KOMMENTARER FRA VARDIN PELAGIC TIL HØRINGSSKRIV FRA (Sama sum hoyringssvar "B"), (OVERSAT TIL DANSK AF "LIVILIG KOR")

Jeg kan i det hele henholde mig til disse høringsbemærkninger.

4.

## BEMÆRKNINGER FRA FORENINGEN LIVILIG KOR

Jeg har modtaget en række bemærkninger fra min klient Foreningen Livlig Kor ved (*navn er dult av umsitingini hjá kommununi*). Foreningen har udarbejdet følgende korte sammendrag:

”Vi har foreholdt os til det materiale, som kommunen sendte ud til nabohøring angående VP’s ansøgning om byggetilladelse til protein- og oliefabrik, foruden det materiale VP sendte til Umhvørvisstovan vedrørende miljøpåvirkninggodkendelse.
De har skullet forholde sig til materiale, der ikke er særlig præcist eller konkret.
Tað er ókeypis at kæra lendismál til Føroya Kærustovn. Miðað verður altíð móti at avgreiða kærumálið skjótast gjørligt, men væntast kann at áleið 5 mánaðir ganga, áðrenn málið er fult upplýst og klárt til støðutakan. Sum kærari verður tú líðandi kunnaður um gongdina í kærumálinum.

Eru spurningar ella ivamál um, hvørt kærast kann til Føroya Kærustovn í einum lendismáli ella annað hesum viðvíkjandi, so kanst tú seta teg í samband við Føroya Kærustovn, ið fegin vegleiðir og svarar fyrispurningum.

Lógargrundarlag
Reglurnar fyri virkseminum hjá Føroya Kærustovni eru ásettar í løgtingslóg nr. 147 frá 25. november 2021 um Føroya Kærustovn og í kunngerð nr. 161 frá 14. desember 2021 um starvsskipan fyri Føroya Kærustovn.

**Tekniska nevnd 04. december 2024:**
Tekniska nevnd mælir framhaldandi til at halda fast um býráðssamtyktina frá 30.12.2023 um at geva byggiloyvi til Varðan Pelagic.
Nevndin hevur ikki fleiri viðmerkingar til málið, og mælt verður til, at byggiloyvið verður útskrivað, treytað av, at øll onnur loyvi í málinum eru avgreidd og fyriliggja.

**Vinnu- og havnanevndin 04. december 2024:**
Vinnu- og havnanevndin mælir framhaldandi til at halda fast um býráðssamtyktina frá 30.12.2023 um at geva byggiloyvi til Varðan Pelagic.
Nevndin hevur ikki fleiri viðmerkingar til málið, og mælt verður til, at byggiloyvið verður útskrivað, treytað av, at øll onnur loyvi í málinum eru avgreidd og fyriliggja.

**Býráðið 06. december 2024:**
Eyð Eidesgaard boðaði frá, at hon metti seg verða ógegniga og var ikki við til viðgerðina av hesum málinum. Borgarstjórin mælir býráðnum til at fylgja tilmælinum hjá Teknisku nevnd og Vinnu- og Havnanevndin, og mælir býráðnum at taka undir við viðmerkingunum og niðurstøðunum hjá umsitingini til innkomin mótmælir. **Einmælt samtykt**

79/24

## 22/00491-2 Varðin Pelagic -umsókn um byggiloyvið til Protein & Lýsiverksmiði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 26.01.2023 | 2/23 |
| 2 Vinnu- og havnanevndin | 15.02.2023 | 5/23 |
| 3 Tekniska nevnd | 15.02.2023 | 16/23 |
| 4 Býráðið | 20.02.2023 | 12/23 |
| 5 Býráðið | 25.07.2023 | 52/23 |
| 6 Vinnu- og havnanevndin | 28.12.2023 | 47/23 |
| 7 Tekniska nevnd | 27.12.2023 | 53/23 |
| 8 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 27.12.2023 | 36/23 |
| 9 Býráðið | 30.12.2023 | 95/23 |
| 10 Tekniska nevnd | 04.12.2024 | 46/24 |
| 11 Vinnu- og havnanevndin | 04.12.2024 | 39/24 |
| 12 Býráðið | 06.12.2024 | 79/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 29.12.2022**
Kristin Michelsen, borgarstjóri hevur d.d. móttikið umsókn um byggiloyvið frá Boga Jacobsen, forstjóra í P/F Varðin og stjóra í P/F Varðin Pelagic til bygging av Protein- & Lýsiverksmiðju.

**Lógargrundarlag: Matrikkullógin og býarskipanarlógin**

**Tilmælið:**
Umsókn er komin frá Varðanum Pelagic, sum ikki er innan fyri karmarnar av verandi byggisamtykt galdandi fyri Tvøroyrar Kommunu. Mælt verður býráðnum til at taka støðu til umsóknina, hvørt umsitingin skal:

1. Gera uppskot til broyting av byggisamtyktini fyri økið eystan fyri verandi matr.nr 493a, har virkisbygningurin hjá Varðin Pelagic er staðsettur.
2. Loyva útfylling á sjógv eystan fyri verandi matr.nr 493a, har verandi virkisbygningurin hjá Varðin Pelagic er staðsettur, har útfylta økið kann verða nýtt til staðseting av protein og lýsuverksmiðju hjá P/F Varðin Pelagic.

**Býráðið 26. januar 2023:**
Borgarstjórin mælir til at málið verður beint í Vinnu og havnanevndina. Einmælt samtykt.

**Kommunustjórin 9. feb.2023:**
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022.

§6. (Kunngerð og framløga byggisamtykta)

*Áðrenn uppskot um byggisamtykt verður sent landsstýrismanninum, skal tað verða lagt fram í minsta lagi 3 vikur til alment eftirlits á einum fólki atkomuligum staði. Kommunan skal frammanundan á vanligan hátt kunngera, at byggisamtyktin er framløgd til eftirlits, og kunngerðin skal skila til, hvørt økið tað er, ið uppskotið umfatar. Mótmæli móti uppskotinum, og broytingaruppskot mega verða send kommunustýrinum, áðrenn 6 vikur eru lidnir frá kunngerðardegnum.*

*Stk. 2. 1) Innkomið mótmæli og broytingaruppskot, sum kommunustýrið ikki tekur við, skulu fylgja við uppskotinum, tá ið hetta verður sent landsstýrismanninum til góðkenningar.*

*Stk. 3. 1) Landsstýrismaðurin kann, tá ið mett verður, at eitt uppskot eigur at verða broytt í einum ella fleiri førum, áðrenn tað kann verða góðkent, gera av, at kommunustýrið av nýggjum skal leggja uppskotið við teim ætlaðu broytingum fram til alment eftirlits aftaná kunngerð eftir reglunum í stk. 1.*

*Stk. 4. Somuleiðis kann kommunustýrið, tá ið tað, orsakað av innkomnum mótmælum ella broytingaruppskotum, hevur samtykt at broyta hitt upprunaliga uppskotið, fáa í lag, at uppskotið við hesum broytingum verður framlagt av nýggjum.*

*Stk. 5. 1) Viðvíkjandi uppskotum, ið viðgjørd verða eftir reglunum í § 4, stk. 4, avger landsstýrismaðurin, nær og hvussu hesi uppskot skulu verða framløgd til eftirlitið umrøtt í hesi grein.*

*Stk. 6. 7) Landsstýrismaðurin kann í heilt serligum førum, eftir áheitan frá kommunustýrinum, taka avgerð um at víkja frá ásettu freistum í stk. 1, soleiðis at framløgutíðin verður ásett til 1 viku og mótmælisfreistin til 1 viku frá kunngerðardegnum. Við áheitanini skal grundgevast fyri, hvørji týðandi samfelagslig og vinnulig atlit tala fyri, at umsóknin kann verða gingin á møti. Verður áheitanin gingin á møti, skal kommunan beinleiðis og persónligt kunna teir borgarar, ið beinleiðis verða ávirkaðir av broytingini, um hetta í seinasta lagi dagin eftir, at frávikið er givið.*

*Stk. 7. 7) Kærur sambært § 10 a um loyvir, ið eru givin við heimild í byggisamtykt, sum er fevnd av stk. 6, hava ikki steðgandi virknað.*

**Tekniska Deild 13-02-2023:**
Eftir áheitan frá býráðnum, 26. januar 2023, verður Vinnu- og havnanevndin biðin um at taka støðu til, hvørt umsitingin skal gera uppskot til byggisamtykt fyri økið (herundir sjóøkið) eystan fyri verandi matr.nr 493a, har virkisbygningurin hjá Varðin Pelagic er staðsettur.

**Vinnu- og havnanevndin 15. februar 2023:**
Samtykt at heita á umsitingina at gera uppskot til broyting av byggisamtyktini, við korti, at leggja fyri býráðið. Talan er um at víðka Havnarøki D uml. 100m eystureftir, og at samstundis at broyta Neystaøki G, ið liggur innanfyri, til Havnarøki.

**Tekniska nevnd 15. februar 2023:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá Vinnu-og havnanevndini. Umsitingin ger uppskot til broyting av byggisamtyktini, og tað verður lagt fyri býráðið.

**Býráðið 20. februar 2023:**
Súsanna Bertholdsen mælir til, at støða verður ikki tikin til málið at gera uppskot til broyting av byggisamtyktini, fyrr enn býráðið hevur havt fund við bólkin «Livilig Kor á Tvøroyri», sum hevur biði um fund við býráðið.
Atkvøtt var um tilmælið hjá Súsannu Bertholdsen.
Fyri eru: Súsanna Bertholdsen
Ímóti eru: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen og Jónleyg Jespersen Bech
Atkvøtt blank: Bjarni Hammer og Kristina Roest
Tilmælið hjá Súsannu Bertholdsen er harvið ikki samtykt.

Atkvøtt var um tilmælið hjá Vinnu- og havnanevndini og Teknisku nevnd.
Fyri eru: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer og Kristina Roest
Ímóti eru: ongin
Atkvøtt blankt: Súsanna Bertholdsen
Tilmælið hjá Vinnu- og havnanevndini og Teknisku nevnd er harvið samtykt.

**Kommunustjórin 19. Juli 2023**
Nú Umhvørvismálaráðið hin 10. juli 2023 -við heimild í § 4 í býarskipanarlógini- hevur góðkent, at byggisamtyktin fyri Tvøroyrar kommunu verður broytt í sambandi við, at Tvøroyrar kommuna hevur móttikið umsókn um byggiloyvi frá P/F Varðin Pelagic til bygging av Protein- & lýsiverksmiðju á Tvøroyri eystan fyri verandi virkisbygning á havnarlagnum, mælir Borgarstjórin til, at Tvøroyrar Býráð viðgerð og tekur støðu til tilmælið at:

- Loyva útfylling á sjógv eystan fyri verandi matr.nr. 493a, har verandi virkisbygningurin hjá Varðin Pelagic er staðsettur, har útfylta økið kann verða nýtt til staðseting av protein og lýsuverksmiðju hjá P/F Varðin Pelagic.
- P/F Varin Pelagic útvegar øll onnur neyðug myndugleika loyvir, ið skulu fyriliggja áðrenn byrja verður uppá at útfylla grót á sjógv.
- Útfyllingin verður framd við avlops gróti úr Hvalbiartunnlinum, sum Tvøroyrar kommuna er eigari av, og sum verður latið til verkætlanina ájavnt gjaldskránna hjá Landsverk fyri m3.
- P/F Varðin Pelagic ber í fyrsta umfarinum allan kostnaðin av útfyllingini, íroknað grótinum og flutingin av hesum úr Hvalbiartunnlinum.
- Áðrenn endaligt byggiloyvið verður givið til bygging av Protein- & Lýsiverksmiðju, verður serstakur sáttmálið gjørdur millum P/F Varðin Pelagic og Tvøroyrar kommuna fyri útfylta sjóøkið.

**Býráðið 25. juli 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá borgarstjóranum.

**Tekniskadeild 10.desember 2023:**
Tekniska deild er liðug at málsviðgerða umsóknina frá P/F Varðin Pelagic at byggja lýsi og protein verksmiðju á havnarlagnum á Tvøroyri eystan fyri verandi virkisbygning hjá P/F Varðin Pelagic.

Talan er bygging á «D» havnarøki, ið samsv. galdandi byggisamtykt § 29 fyri Tvøroyrar kommunu við áseting:

*1) Økið verður lagt av til havnaendamál (herundir eisini bátahavnir) og virkir, sum hava samband við skipaferðslu og fiskivinnu og til virksemi, ið hevur samband við tey.*
*2) Byggistigið fyri havnarøkið sum heild má ikki fara upp um 0,3.*
*3) Rúmmálið á húsinum má ikki, uttan serloyvi frá býráðnum, fara upp um 3 m³ fyri hvønn m² av samlaða økinum, ið er lagt út sum havnarøki.*
*4) Eingin partur av útveggi ella tekju má vera hægri enn 11,5 m, tó kunnu neyðugir tekniskir húsalutir vera hægri eftir nærri góðkenning býráðsins. Goymslubrunnar kunnu í mesta lagi vera 20 m høgir, og skorsteinar í mesta lagi vera 60 m høgir. Slík hægri bygging skal altíð sendast til almennar hoyringar.*
*5) Bygt má ikki vera nærri bryggjutrom enn 10 m ella nærri aðrari bygging enn 5 m.*
*6) Neystabygging verður ikki loyvd á hesum økinum, og loyvt verður ikki, at verandi neyst verða útbygd. Um eitt neyst verður tikið niður, verður ikki givið loyvið til at byggja uppaftur.*
*7) Býráðið hevur heimild til at gera, ella at geva loyvi til, útfyllingar út á sjógv innanfyri tað økið, sum er lagt út til havnarøki á plankortinum.*

Vísandi til umsókn frá P/F Varðin Pelagic dagf. 29. Des. 2022, við dagførdum tekningum dagf. 26. Jan. 2023, verður mælt til at geva byggiloyvið við niðanfyri treytum.

Bygt verður samb. galdandi byggisamtykt fyri Tvøroyrar kommunu, og byggingin verður framd samb. galdandi áseting í bygningskunngerðini. Tað verður álagt byggiharranum at útvegar sær øll neyðug myndugleika loyvir, ið byggiharrin verður at neyvt at fylgja. Eisini verður víst til sáttmálan [avtalu] millum Tvøroyrar kommunu og P/F Varðin Pelagic, mál 23/00384 "P/F Varðin Pelagic -avtala um uppfylt sjóøkið til protein & lýsiverksmiðju"

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 27. december 2023:**
Nevndin er kunnað um verkætlanina, og tekningartilfarið ið fyriliggur.
Nevndin heitir á Varðin Pelagic um at kanna møguleikarnar fyri at gagnnýta avlopsorkuna.

**Tekniska nevnd 27. december 2023:**
Nevndin tekur undir við at lata byggiloyvi til protein og lýsiverksmiði út frá fyriliggjandi tekningartilfar.

**Vinnu- og havnanevndin 28. december 2023:**
Nevndin tekur undir við at lata byggiloyvi til protein og lýsiverksmiði út frá fyriliggjandi tekningartilfar, treytað av, at umhvørvisgóðkenning verður givin, og at avtalan (um uppfylta sjóøkið v.m.) kemur uppá pláss.

**Býráðið 30. december 2023:**
Borgarstjórin mælir til at atkvøtt verður um tilmælini frá Trivnaðar- og umhvørvisnevndini um at heita á P/F Varðin Pelagic um at kanna møguleikarnar fyri at gagnnýta avlopsorkuna. **Einmælt samtykt**

Borgarstjórin mælir til at atkvøða verður undir einum um tilmælið hjá Teknisku nevnd og Vinnu – og havnanevndini at lata byggiloyvið til protein- og lýsuverksmiðju út frá fyriliggjandi tekningartilfari, við treyt um at umhvørvisgóðkenning fyriliggur og at bygt verður samsvarandi avtalu millum Tvøroyrar kommunu og P/F Varðin Pelagic um uppfylt sjóøki til bygging av protein- og lýsuverksmiðju. **Einmælt samtykt**

***

**<u>Kommunustjórin 20.11.2024</u>**
Umsóknin frá P/F Varðin Pelagic um útfylling á sjógv og bygging av protein og lýsuverksmiðju eystan fyri verandi virkisbygningin hjá Varðin Pelagic á matr. nr. 493a, er í samsvari við almennu byggisamtyktina fyri Tvøroyrar kommunu og byggilógina.

Umsóknin lýkur soleiðis ásetingar og myndugleika krøv. Kommunala viðgerðin av byggiloyvum er skipað og bundin av reglum, soleiðis at skilja, at um ein umsókn samsvarar við allar ásetingar og myndugleika krøv, so hevur umsøkjarin rætt til at fáa útskrivað byggiloyvi.

Tvøroyrar kommuna hevur hin 12. Juni 2024, móttikið endaligt góðkenningarskriv frá Umhvørvismálaráðnum av broytingin av byggisamtyktini fyri §29,. Øki D havnarøkið stk. 4, við orðingini. *«Eingin partur av útveggi ella tekju má vera hægri enn 11,5 m, tó kunnu neyðugir tekniskir húsalutir vera hægri eftir nærri góðkenning býráðsins. Goymslubrunnar kunnu í mesta lagi vera 20 m høgir, og skorsteinar í mesta lagi vera 60 m høgir. Slík hægri bygging skal altíð sendast til almennar hoyringar.»*

Tvøroyrar kommuna hevur havt almenna hoyring, samb. §29 stk 4 í byggisamtyktini, við atliti til hægri bygging. Tvøroyrar býráð hevur viðgjørt tey 3 innkomnu hoyringarsvarini og samtykt bleiv hin 19. feb. 2024, at partur av fjøruni verður varðveittur, soleiðis at neystaeigarar framhaldandi fáa atkomu til fjøruna og kunna brúka teirra bátadrátt.

Tvøroyrar kommuna hevur havt parts- og grannahoyringar samb. § 18, stk. 1 í fyrisitingarlógini, um ætlanina at geva byggiloyvið til PF. Varðin Pelagic at byggja protein- og lýsuverksmiðju á havnalagnum á Tvøroyri. Send vóru íalt 54 hoyringarskriv og innkomin eru 5 svar. Hesi eru øll viðgjørd fyri seg í serstøkum máli: 24/00094 *"P/F Varðin Pelagic -parts- & grannahoyring, samb. § 18, stk. 1 í fyrisitingarlógini, við atliti til bygging á havnalagnum"*

Yvirskipaða niðurstøðan hjá umsitingini er, at flest allar viðmerkingar í mótmælinum, ið eru sendar til kommununa -*samsv. mál 24/00094 hoyring samb. fyrisitingarlógina*- snúgva seg um viðurskiftir, ið eru tengd at og viðgjørd í Umhvørvisgóðkenningini av virkseminum hjá P/F varðin Pelagic.

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum:**

**Náttúrufriðingarnevndin:**
Náttúrufriðingarnevndin hevur á fundi hin 27. nov. 2024 samtykt einmælt at ganga umsóknini hjá P/F Varðin Pelagic -dagf. 3 okt. 2024 á møti og loyva bygging á havnalagnum á Tvøroyri, sum felagið stóð fyri árini 2012 til 2024. Og Náttúrufriðingarnevndin hevur á fundi hin 27. nov. 2024 staðfest avgerðina hin 12. mars 2024 um at geva P/F. Varðin Pelagic loyvið til útbygging. Náttúrufriðingarnevndin var samd um, at tað, sum er komið fram eftir fundin í nevndini tann 12. mars 2024, og tær hoyringar, sum hava verið, ikki gevur nevndini grundarlag fyri at broyta samtyktina frá 12. mars 2024.

Náttúrufriðingarnevndin ger vart við, at avgerðir ella partar av avgerðum, sum Náttúrufriðingarnevndin fyri Suðuroyar Sýslu tekur, innan 4 vikur frá avgerðardegnum kunna kærast til Yvirfriðingarnevndina.

**Skógfriðingarnevndin:**
22.11.2024. Skógfriðingarnevndin metir ikki, at útbyggingarnar av havnarlagnum og virkisbygningum hjá Varðanum Pelagic í tíðarskeiðinum frá 2013 og fram til í dag hevur havt neiliga ávirkan á skógfriðaðu økini við Tvøroyrar kirkju, matr. nr. 513, Froðba. Hon hevur tí ongar viðmerkingar til málið. Avgerðin er grundað á heimildina hjá Skógfriðingarnevndini, sum liggur í §2 í Løgtingslóg um viðarlundir, sum tilskilar at uppgávan hjá nevndini er "at hava eftirlit við friðaðum viðarlundum til verndar av vøkstri og dýrum á hesum lendum".

**Kirkjuráðið:**
Vegna Føroya Stiftsstjórn (FSS) verður boða frá, at FSS tann 23. mars 2023 svaraði Próstadømisráðnum, at FSS ikki gjørdi meira við málið. Føroya Stiftsstjórn kann tó upplýsa um, at vísandi til friðingarlógini frá 1948 er friðingarheimildin, tá ein bygningur verður friðaður, 100 m. Frástøðan frá kirkjuni á Tvøroyri oman til vegin undir Heygnum er 103 m. Sostatt er byggingin hjá Varðanum Pelagic uttan fyri friðingarheimildina. Føroya Stiftsstjórn ger ikki meiri við málið.

**Umhvørvisstovan hoyringar sendar til kommununa:**
Árinskanningar til hoyringar hjá Tvøroyrar býráð:
Tvøroyrar býráð hevur hin 17. Juli 2024 viðgjørt hoyring -av árinskanning- til uppskot til góðkenning av virkseminum hjá P/F Varðin Pelagic á havnarlagnum á Tvøroyri sambært § 21 í havumhvørvislógini, ið umhvørvisstovan hevur sent kommununi til hoyringar. Sagt bleiv at umhvørvisárinsmetingin er gjørd av Varðanum Pelagic og Verkfo eftir dagførdari "*Vegleiðing um góðkenning og umhvørvisárinsmeting av verkætlanum á sjónum og í sjóvarmálanum, útgáva 3 frá 12. jan 2024*". Í útgávuni er ávirkan á fólk og bústaðarøki er tikið burturúr. Hesin partur er tí ikki við í hesi frágreiðing, men verður lýstur í sambandi við umsókn um umhvørvisgóðkenning ístaðin.
Býráðið samtykkir einmælt hin 17. Juli 2024, at taka undir við tilmælinum hjá Vinnu- og havnanevndin, Trivnaðar- og umhvørvisnevndin og Tekniska nevnd, at góðkenna uppskot til árinskanning uttan viðmerkingar.

Umhvørvisgóðkenning til hoyringar hjá Tvøroyrar býráð:
Tvøroyrar býráð hevur hin 26. september 2024 viðgjørt hoyring av uppskot til umhvørvisgóðkenning av virkseminum hjá P/F Varðin Pelagic á havnarlagnum á Tvøroyri. Býráðið samtykkir einmælt at taka undir við tilmælinum hjá Vinnu- og havnanevndin, Trivnaðar- og umhvørvisnevndin og Tekniska nevnd, at góðkenna uppskot til umhvørvisgóðkenning av virkseminum hjá P/F Varðin Pelagic uttan viðmerkingar.

**Umhvørvisstovan góðkenning:**
Umhvørvisstovan kunngerð hin 25. november 2024, at við heimild í løgtingslóg um umhvørvisvernd, hevur Umhvørvisstovan góðkent virksemið hjá Varðanum Pelagic á Tvøroyri. Henda umhvørvisgóðkenning av uppisjóvarvirkinum hjá P/F Varðin Pelagic, sum tekur ímóti uppisjóvarfiski, sker flak, frystir og framleiðir súrløgu, fiskaprotein og lýsi á matr. nr. 493a, 493b, 887a og á nýggju útfyllingini á Havnarlagnum 11 á Tvøroyri, er givin við heimild í §§ 26, 29 og 36, 3. stk. í umhvørvisverndarlógini og § 1, nr. 4 í kunngerð um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Umhvørvisstovuna. Eftirlitið við virkseminum verður útint sambært kap. 7 í umhvørvisverndarlógini.

Og Umhvørvisstovan kunngerð hin 17. sep. 2024 at Umhvørvisstovan góðkennir hervið ætlan hjá P/F Varðin Pelagic um at gera útfylling út á sjógv, at byggja goymslubygning, protein- og lýsivirki og av samlaða virkseminum hjá Varðanum Pelagic á havnarlagnum á Tvøroyri. Góðkenningin er givin við

heimild í § 21, stk. 1 og 2 í løgtingslóg nr. 59 frá 2005 um verju av havumhvørvinum við seinni broytingum.

Umhvørvisstovan kunngerð at avgerðin kann kærast til landsstýriskvinnuna í umhvørvismálum. Kærufreistin er fýra vikur frá tí at avgerðin er almannakunngjørd, og skal vera Umhvørvisstovuni í hendi í seinasta lagi 23. desember 2024. Kærurætt hava tey, sum avgerðin hevur ein serstakan, beinleiðis og persónliga týdning fyri.

**Tilmæli hjá umsitingini til treytir í byggiloyvinum:**
Umsitingin mælir til at staðfesta avgerðina um at skriva út byggiloyvi til PF. Varðin Pelagic at byggja protein- og lýsuverksmiðju á havnalagnum á Tvøroyri, ið var samtykt 30. desember 2023, við niðanfyri treytum.

At bygt verður samsv. almennu byggisamtykt fyri Tvøroyrar Kommunu.

At P/F. Varðin Pelagic útvegar sær øll neyðugt myndugleikaloyvir, áðrenn byrja verður at byggja, og at kommunan fær avrit av øllum myndugleikaloyvum.

At bygt verður eftir ásetingum og krøvum í bygningskunngerðini BKF17, og bygt verður samsv. tekningum hjá Fuglark, ið kommunan hevur móttikið við uppruna dagf. 05/03/24, við rætting 08/07/24, har, ið m.a. fjøran verður varðveitt.

At útfyllingin av gróti eystan fyri matr.nr 493a, har verandi virkisbygningurin hjá P/F Varðin Pelagic er staðsettur, verður at fara fram samb. ásetingum hjá Umhvørvisstovuni um útfylling av gróti á sjógv.

At verkætlanin verður framd sum greitt er frá í umsóknartilfarinum og samsv. umhvørvisgóðkenningini.
At P/F Varðin Pelagic framsendur alt nágreiniliga tekniska tilfarið, ið lýsir verkætlanina. Har ið m.a.:

- Lendisarbeiði, útfylling og kaisíða.
- Víðkan av virkinum. Herundir eisini dagført berandi-, kloakk- og brandprojekt, fyri samlaða bygningin.
- Nýggja goymslubygningin eystanfyri virkið, herundir berandi-, kloakk- og brandprojekt.
- Goymslutangar á suðursíðuni og avskipingarkrana.
- Tekniskt rúm, við tilhoyrandi skorsteini á norðursíðuni.
- Liðugtger og skipan av økinum uttan um bygningarnar.

At um neyðugt verður at gera frávík ella broytingar í tekningum ella ætlanum, skal hetta verða í samráð við teknisku deild hjá Tvøroyrar kommunu.

**Tekniska nevnd 04. december 2024:**
Tekniska nevnd mælir framhaldandi til at halda fast um býráðssamtyktina frá 30.12.2023 um at geva byggiloyvi til Varðan Pelagic.
Nevndin hevur ikki fleiri viðmerkingar til málið, og mælt verður til, at byggiloyvið verður útskrivað samsvarandi tilmælinum frá umsitingini, treytað av, at øll onnur loyvi í málinum eru avgreidd og fyriliggja.

**Vinnu- og havnanevndin 04. december 2024:**
Vinnu- og havnanevndin mælir framhaldandi til at halda fast um býráðssamtyktina frá 30.12.2023 um at geva byggiloyvi til Varðan Pelagic.
Nevndin hevur ikki fleiri viðmerkingar til málið, og mælt verður til, at byggiloyvið verður útskrivað samsvarandi tilmælinum frá umsitingini, treytað av, at øll onnur loyvi í málinum eru avgreidd og fyriliggja.

**<u>Býráðið 06. december 2024:</u>**
Eyð Eidesgaard boðaði frá, at hon metti seg verða ógegniga og var ikki við til viðgerðina av hesum málinum. Borgarstjórin mælir býráðnum til at fylgja tilmælinum hjá Teknisku nevnd og Vinnu- og Havnanevndini um at at halda fast um býráðssamtyktina frá 30.12.2023 at geva byggiloyvi til Varðan Pelagic, og at byggiloyvið verður útskrivað samsvarandi tilmælinum frá umsitingini, treytað av, at øll onnur loyvi í málinum eru avgreidd og fyriliggja. **-Einmælt samtykt**

## 80/24
## 24/00349-1 FÆ2024 -Eykajáttanir flytingar millum íløgur og rakstrarstøð

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 28.11.2024 | 79/24 |
| 2 Býráðið | 06.12.2024 | 80/24 |

**Málslýsing: Kommunustjorin 26.11.2024**
Fíggjardeildin hevur pr. 26. nov. 2024 gjørt upp yvirlit yvir játtanir FÆ2024 og realisera kostnað á rakstrarstøðum. Avgjørt hevur verði at fremja umraðfestingar í avsetingunum til løgur og rakstur og er tí neyðugt við flytan av játtan á rakstrarstøðum. Neyðugt hevur verði við hægri rakstrarjáttan á einkultum rakstrarstøðum, eins og minni nýtsla hevur verði á summum rakstrarstøðum.

Eykajáttanirnar eru metingar hjá fíggjarleiðara og kommunustjóra og eru grundaðar á fyriliggjandi uppgerð, og verða allar umraðfestingar játtaðar innan fyri sama rakstarstað.

Fíggjarleiðarin og kommunustjórin mæla til, at fíggja eykajáttan innan fyri verandi fíggjarkarm við flytingum av játtanum innan hvørja grein sær, samsvarandi niðanfyri yvirlit *"Eykajáttanir 2024"*. -Málið skal hava tvinnar viðgerðir í býráðnum.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
FÆ2024 -flytan millum íløgu og rakstarjáttanir

**Tilmælið:**
Fíggjarleiðarin og kommunustjórin mæla til at veita eykajáttan og regulering av FÆ2024, samsv. niðanfyri:

| Flutt verður frá niðanfyri rakstrar- og íløgustaði | | | |
|---|---|---|---|
| **Konto** | **Kontoheiti** | **Slag** | **Upphædd** |
| 115 | Fyrisiting | Løgur | -500.000 |
| 122 | Kunningarstovan | Rakstur | -150.000 |
| 310 | Barnagarður | Rakstur | -900.000 |
| 609 | Bygningar | Løgur | -1.000.000 |
| 615 | Bygging | Løgur | -500.000 |
| 632 | Viðalundir | Rakstur | -240.000 |
| 633 | Viðalundir | Løgur | -450.000 |
| 635 | Bygging | Løgur | -180.000 |
| 619 | Kirkjugarð | Løgur | -1.875.000 |
| 630 | Umhvørvistiltøk | Rakstur | -75.000 |
| 620 | Vatn | Rakstur | -200.000 |
| 621 | Vatn | Løgur | -550.000 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 623 | Kloakk | Løgur | -2.800.000 |
| | | | **-9.420.000** |

**Flutt verður til niðanfyri rakstrar- og íløgustøð:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 126 | Kommunustýrislimir | Rakstur | 350.000 |
| 112 | Val | Rakstur | 125.000 |
| 114 | Fyrisitingin | Rakstur | 450.000 |
| 210 | Kommunulæknar | Rakstur | 50.000 |
| 214 | Tannrøkt | Rakstur | 250.000 |
| 215 | Tannrøkt | Løgur | 250.000 |
| 218 | Barnavernd | Rakstur | 150.000 |
| 311 | Barnagarður | Løga | 1.200.000 |
| 312 | Frítíðarskúlin | Rakstur | 300.000 |
| 300 | Ung í arbeiði | Rakstur | 120.000 |
| 317 | Spælipláss | Løga | 685.000 |
| 414 | Forskúlin | Rakstur | 80.000 |
| 524 | Virðiskort | Rakstur | 30.000 |
| 525 | FSR | Løga | 1.550.000 |
| 526 | Bókasavn | Rakstur | 25.000 |
| 530 | Svimjihøll | Rakstur | 10.000 |
| 532 | Ítróttarhøllin | Rakstur | 100.000 |
| 614 | Fríðkan | Rakstur | 250.000 |
| 616 | Hegn og bøgarðar | Rakstur | 20.000 |
| 714 | Sløkkiliðið | Rakstur | 575.000 |
| 718 | Tvøroyrar Havn | Rakstur | 850.000 |
| 810 | Rentustuðul | Rakstur | 800.000 |
| 820 | Rentur | Rakstur | 1.200.000 |
| | | | **9.420.000** |

Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**<u>Fíggjarnevndin 28. november 2024:</u>**
Einmælt samtykt at veita eykajáttan og reguleringar á FÆ2024, samsv. omanfyri tilmælið hjá fíggjarleiðaranum og kommunustjóranum. Málið verður beint í býráðið og skal hava tvinnar viðgerðir.

**<u>Býráðið 06. december 2024:</u>**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Fíggjarnevndini at veita eykajáttan og reguleringar á FÆ2024, samsv. tilmælið hjá fíggjarleiðaranum og kommunustjóranum. -Málið skal hava tvinnar viðgerðir.

**81/24**
**24/00314-2 Bilur til umsitingina**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 31.10.2024 | 69/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 28.11.2024 | 75/24 |
| 3 Býráðið | 06.12.2024 | 81/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 30.10.2024**
Mælt verður til at kommunan eigur ein bil til starvsfólkini í umsitingini at brúka. Sum støðan er nú, koyra starvsfólk í egnum bili, tá tey skulu røkja arbeiðsuppgávur, kring um í kommununi, eitt nú tá hesi skulu á fundir við aðrar kommunur og stovnar.

**Lógargrundarlag:** Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:** Onki avsett á FÆ2024, mælt til at fíggja keypið av §115 íløgujáttan til býráðsskrivstovu. Avsett eru kr. 700.000,- onki er brúkt d.d.

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 31. oktober 2024:**
Heitt verður á umsitingina um at innheinta fleiri tilboð. Málið verður útseta til ein seinni fund í fíggjarnevndin.

**Kommunustjórin 26.11.2024:**
Kommunustjórin hevur samskift við seljara, ið hevur ein brúktan bil til sølu fyri kr. 150.000,-, ið lúkar tørvin hjá umsitingini. Mælt verður til til at fíggja keypið av §115 íløgujáttan til býráðsskrivstovu.

**Fíggjarnevndin 28. november 2024:**
Einmælt samtykt at umsitingin útvegar ein arbeiðsbil samsv. uppskot hjá kommunustjóranum 26.11.2024, ið verður fíggja av §115 íløgujáttan til býráðsskrivstovu.

**Kommunustjórin 02.12.2024:**
Bilurin, sum kommunustjórin hevði samskift við seljara um er seldur. Tað er ikki lætt at finna ein hóskandi bil, ið stødd og tørvsmeting fyri minni upphædd enn kr. 250.000,-.

**Býráðið 06. december 2024:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá kommunustjóranum, og játta arbeiðsbili fyri kr. 250.000,- -málið skal hava tvinnar viðgerðir.

**Til kunningar**

## 25/24
## 24/00004-1 Skattatøl 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.02.2024 | 2/24 |
| 2 Býráðið | 29.02.2024 | 4/24 |
| 3 Fíggjarnevndin | 14.03.2024 | 5/24 |
| 4 Býráðið | 25.03.2024 | 9/24 |
| 5 Fíggjarnevndin | 03.05.2024 | 8/24 |
| 6 Býráðið | 06.05.2024 | 13/24 |
| 7 Fíggjarnevndin | 06.06.2024 | 9/24 |
| 8 Býráðið | 06.06.2024 | 14/24 |
| 9 Býráðið | 17.07.2024 | 18/24 |
| 10 Býráðið | 26.09.2024 | 21/24 |
| 11 Fíggjarnevndin | 31.10.2024 | 13/24 |
| 12 Býráðið | 07.11.2024 | 23/24 |
| 13 Býráðið | 06.12.2024 | 25/24 |
| 14 Býráðið | | |

**Málslýsing:  Kommunustjórin 01.02.2024**
Til kunning og umrøðu samanbering av skattainntøkum 2023/2024

**Lógargrundarlag:** Kommunustýrislógin

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2024/2025

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og býráðnum til kunning og umrøðu.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 29. februar 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Fíggjarnevndin 14. marts 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 25. marts 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Fíggjarnevndin 03. maj 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 06. maj 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 06. juni 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 06. juni 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 17. juli 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 26. september 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Fíggjarnevndin 31. oktober 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 07. november 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 06. december 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað

**26/24**
**24/00340-2 Kommunufelagið hoyringarskriv: Uppskot til Kunngerð um útrokning av umsetningi í kappingarlóggávuni er komið til ummælis.**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 28.11.2024 | 80/24 |
| 2 Býráðið | 06.12.2024 | 26/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 15.11.2024**
Kommunufelagið hevur sent Tvøroyrar kommunu hoyring av**:** *" Uppskot til Kunngerð um útrokning av umsetningi í kappingarlóggávuni er komið til ummælis"*

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 28. november 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 06. december 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað

**27/24**
**24/00329-2 Kariesskrásetingin 1991-2023**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | | |
| 2 Býráðið | 06.12.2024 | 27/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 08.11.2024**
Viðfest hagtøl fyri kariesstøðuna hjá børnum og ungum í Føroyum frá 1991-2023,
Vegna SEF nevndina.

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg um barna- og ungdómstannrøkt, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 59 frá 29. mai 2024

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið sosialu nevndini og býráðnum til kunning.

**Býráðið 06. december 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað

Fundurin lokin kl. 16:55

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Alvi Mortensen

Jónleyg Jespersen Bech

Bjarni Hammer

Kristina Roest

Eyð Jóna Eidesgaard